Bartal Nolsøe Poulsen, byrjar á MIT:

# Skúlagongdin fíggjað

**Bartal Nolsøe Poulsen hevur fingið neyðugu figgingina, soleiðis at hann kann fara vesturumhav á kenda skúla MIT at ganga. Talan er um góðar 285.000 krónur, ið Bartal hevur fingið**



*20 ára gamli Bartal úr Froðba leggur hósdagin leiðina til USA, har hann skal ganga á einum víðagitnum skúla*

ÚTBÚGVING
*Ragnhild Ellingsgaard*
*Heri á Rógvi*

Komandi hósdag fer Bartal avstað til USA, har hann byrjar skúlagongd sína á víðagitna og vælumtókta skúlanum Massachusetts Institute of Technology. Skúlin liggur beint uttanfyri Boston í Massachusetts, og er ein av teim fremstu í øllum USA.

Samstundis hevur skúlin eitt tætt samstarv við Harvard, sum flest av okkum kenna. Hetta viðførir, at Bartal, eftir fyrsta skúlaárið á MIT, uttan trupulleikar kann flyta skúlagongd sína yvir á Harvard.

Sosialurin skrivaði fyrr í summar um hendan unga føroying, sum nú rættiliga fær seg royndan á einum skúla, sum er betri enn teir flestu. Ein slík skúlagongd er sera kostnaðarmikil, og tá hevði Bartal enn ikki fingið nakra fígging til vega, sum kundi hjálpa honum á vegnum.

Men gjøgnum eitt tætt samstarv við skúlan gjøgnum alnótina hevur Bartal fingið skipað soleiðis fyri, at hann fær fígging veitta gjøgnum alla skúlagongdina.

## 285.000 krónur

At fara undir víðari lestur á einum so víðagitnum skúla sum MIT er ikki bara sum at siga tað. Hvørt skúlaár kostar um 300.000 krónur, og hetta skal sjálvandi gjaldast, um tú vilt halda fram á skúlanum.

Tó hevur skúlin eitt sokallað sentur, har næmingar kunnu søkja um at fáa fígging, soleiðis at teir ikki skulu gjalda alla skúlagongdina sjálvir.
Bartal hevði hoyrt um hendan møguleikan, og setti hann seg í samband við sentrið, tá hann fekk at vita, at hann var sloppin gjøgnum nálareygað.

– Seinastu tíðina havi eg gjøgnum alnótina havt eitt tætt samskifti við sentrið, og fyri tveimum vikum síðani fall tað síðsta upp á pláss, greiðir Bartal frá.

Gjøgnum sentrið á skúlanum hevur Bartal fingið fíggjað umleið 280.000 krónur hvørt skúlaár. Hetta merkir, at sjálvur skal Bartal einans gjalda um 15.000 krónur fyri hvørt árið.

– Tað ger tað sjálvandi mundandi lættari fyri meg, heldur Bartal.

MIT er sum sagt ein av fremstu skúlunum í øllum heiminum, og tætta samstarvið við Harvard hevur eisini ført við sær, at nógvir næmingar hvør t ár søkja um upptakilsi á skúlanum.

Møguleikin fyri at sleppa inn er av tí sama ikki av teim størstu, men 20 ára gamli Bartal úr Froðba er sloppin innum. Hann er samstundis møguliga tann fyrsti føroyingurin, sum fer á henda kenda skúla.

– Eg veit um ein dana, sum gongur á skúlanum nú. Men skúlin visti ikki um nakran skrásettan føroying at siga mær, so møguliga eri eg tann fyrsti, sigur Bartal.

## Nógvar fyrireikingar

Hóast Bartal hevur fingið fíggjarligu viðurskiftini avgreidd, so er tó nógv annað, ið eisini skal gerast.

– Í fyrstani hugsaði eg mest um at fáa fígging. Tá eg so hevði fingið hana, kom eg í tankar um so nógv onnur viðurskifti, sum eisini mugu fáast upp á pláss, áðrenn eg fari avstað, greiðir Bartal frá.

Millum hesi eru at fáa til vega nýggjan sjúkrakassa, flyta bústað og nógv smærri viðurskifti.

– Ein fær ikki rættiliga fyrireika seg til at fara avstað, tí alt virkar so ókent. Hetta er ikki sum at fara til Danmarkar, sigur Bartal.

Sjálvur væntar Bartal, at eitt rætt kultur-sjokk bíðar honum, tá hann lendir í USA.

– Men tað verður uttan iva sera spennandi eisini, heldur ungi maðurin úr Froðba.

Fólkini rundan um Bartal fylgja eisini spent við í øllum fyrireikingunum, og nógv venda sær til hansara við ymsum spurningum um snarligu fráferðina.

– Tey flestu hava hoyrt, at eg eri sloppin inn á ein so kendan skúla, og tey spyrja so um alt møguligt. Tað er bara stuttligt, greiðir hann frá.

## Harvard ein møguleiki

Um 14.000 næmingar ganga á MIT-skúlanum, og verður Bartal skjótt ein partur av hesum. Eini 1.300 næmingar byrja saman við honum á fyrsta floksstignum, og teir flestu av hesum búgva eisini á skúlanum.

Skúlin er kendur fyri náttúruvísundaligu frálæruna, og er hon eisini orsøkin til, at Bartal av fyrstani tíð søkti inn á skúlan.

Eftir fyrsta skúlaárið ber til hjá Bartali at flyta skúlagongdina til kenda skúlan Harvard, sum er eitt satt reiður av Nobel-vinnarum.

Fleiri av lærarunum á skúlanum hava vunnið Nobel-virðislønir, og millum gomlu næmingarnar telist millum aðrar kendar menn eisini Kofi Annan, S.T.-aðalskrivarin.





# Føroyski barnafilmurin eitt fet nærri veruleika

**Ætlanirnar um ein veruligan føroyskan barnafilm eru nú eitt fet nærri veruleikanum, eftir at tveir av tungu dreingjunum innan danska filmsheimin hava vitjað í Føroyum í góðveðrinum og hitt føroysku íbirtararnar. Hóast talan er um film, ið snýr seg um tað yvirnáttúrliga, so tykjast ætlanirnar nærkast veruleikanum eftir vitjanina**



*Trølla Pætur er vanur at standa frammanfyri upptøkutólinum. Nú hava menninir handan Trølla Pætur ætlanir um stóran barnafilm og stór nøvn innan danska filmsheimin hava vitjað í Føroyum og víst ætlanini stóran áhuga*

FILMUR
*Dagfinn Olsen*

Tveir av tungu dreingjunum innan danska filmsheimin eru júst farnir av landinum aftur. Teir hava hitt menninar aftanfyri filmarnar um Trølla Pætur, sum hava ætlanir um ein føroyskan barnafilm, ið skal snúgva seg um ein føroyskan drong, ið hevur óvanligt tilknýti til tann heim, eingin vanliga sær. Eitt samspæl millum tað náttúrliga og tað yvirnáttúrliga.

Stóru donsku nøvnini, ið hava vitjað, eru Hans Hansen, ið m.a. hevur havt ein fingur við í filmum sum »Gummi Tarzan« og »Vil du se min smukke navle« Hann hevur tilknýti til filmsfelagið Zentropa, har Lars von Trier eisini heldur til. Hitt stóra navnið er Ulrik Breuning, ið hevur havt týðandi leiklut í framleiðsluni av donskum barnafilmum. Hann er fyrrverandi stjóri í Nordisk Film Junior.

Og hóast hugskotið hjá føroysku stigtakarunum er at fáa lív í aftur føroyska álvaheimin, tann yvirnáttúrliga heimin, so tykjast ætlanirnar nú hava førkað seg nærri veruleikanum.

## Sáttmáli ávegis

Føroyingarnir, ið hava arbeitt við ætlanini um føroyska barnafilmin, eru klaksvíkingarnir Niklas Heri Jákupsson, Steintór Rasmussen og Jógvan Eliasen. Teir eru eisini menninir handan Trølla Pætur og filmarnar um hann.

Í døgunum frá 1. august til 5. august hava donsku filmsmenninir vitjað klaksvíkingarnar fyri at tosa um ætlanirnar og fyri at hyggja seg um í Føroyum.

Niklas Heri Jákupsson er væl nøgdur, nú fyrsta vitjanin hjá donsku filmsmonnunum er av, tí samstarvið hevur verið gott, ein fyribils sáttmáli er um at koma undir land, og eggjanin til at halda fram var ovurhonds stór.

– Jú, ætlanin er spennandi enn. Áhugin hjá donsku filmsmonnunum var stórur og ein fyribils sáttmáli er ávegis, so vit fáa arbeiðsfrið. Ætlanin nú er, at vit skriva og hava dedline tann 1. oktober og so kann kanska filmur spyrjast burturúr í 2004. Men hetta er long arbeiðsgongd og eg ljóði kanska nakað positivur, men nógvir garðar eru, ið vit skulu uppum, sigur Niklas Heri.

Og hann hevur orsøk at fegnast, tí tað er jú ikki bert ein og hvør, ið hevur sýnt áhuga, men stór nøvn innn danskan film.

Og hóast nógvar garðar at fara um, so er eingin ivi um, at siga donsku filmsmenninir seg styðja føroysku ætlanina, so fara nógv portur upp og nógvar forðingar burtur, sum døgg fyri sól.

## Góða søgan

– Nú leita vit eftir góðu søguni. Ikki tí, tað vit hava gjørt er gott, men vit kunnu altíð leita eftir betri søgu. Vit hava við filmsmenninar tosað um okkara upplegg og fingið góð ráð.

– Men arbeiðsgongdin er drúgv og vegurin langur. Vit skulu koma við góðu søguni. So skal áhugin staðfestast hjá donsku filmsmonnunum. So skal handritið skrivast og skal so leggjast fyri Dansk Fimsinstitut, ið stuðlar við eini 50 prosentum. Síðani skal restin av stuðlinum finnast, greiðir Niklas Heri frá um arbeiðsgongdina.

Tungu donsku dreingirnir innan danskan film tóktust sera hugtiknir av tí teir sóu, tá teir vitjaðu ymsastaðir í Føroyum. Og góða veðrið síðstu dagarnar hevur eisini gjørt sítt til, at ein føroyskur barnafilmur tykist hómast í havsbrúnni.

– Nú ljóðar hetta positivt, men vit eru greiðir yvir, at stór vónbrot kunnu koma og aðrar ætlanir kunnu léttliga yvirhála, sigur Niklas Heri, sum í hesum døgum spentur bíðar eftir postinum, tí ein fyribils sáttmáli, ið gevur arbeiðsfrið eitt tíðarskeið, er ávegis.

Hugskotið er ein norðurlendskur barna og ungdómsfilmur, har ein drongur hevur samband við álvar og og yvirnáttúrliga heimin, ein filmur um kærleika millum ung úr ymsum londum og sambandið og tvístøður millum ung og eldri.

Hóast yvirnáttúrliga íkastið, so tykjast føroysku filmsætlanirnr nærkast veruleika, nú tveir kendir danskir filmsframleiðarar hava vitjað og framvegis vís ætlanini stóran áhuga.

# Norðurlendsku sjónleikadagarnir byrja

**Í dag verða Norðurlendsku Sjónleikadagarnir settir og umframt sjónleikir, so er eisini handan av Norðurlendska Dramatikaravirðislønini á skránni. Hana fær Jóanes Nielsen handaða fyri leikin »Eitur nakað land week-end?«, sum verður leiktur**



*Í samband við Listastevnuna verða Norðurlendsku Sjónleikardagarnir settir í dag klokkan 18 í Norðurlandahúsinum*

LISTASTEVNAN
*Dagfinn Olsen*

Í samband við Listastevnuna verða Norðurlendsku Sjónleikardagarnir setiir í dag og nógvir leikir eru á skránni. Dagarnir, Nordiske Teaterdage, verða hildnir anað hvørt ár.

Setanin verður í Klingruni í Norðurlandahúsinum í dag, 7. august, klokkan 18.

## Virðisløn

Undir setanini verða røður, upplestur, tónleikur og eisini verður Norðurlendska Dramatikaravirðislønin handað Jóanesi Nielsen, sum fær hana fyri leikin »Eitur nakað land week-end?« Jóanes Nielsen vann eisini leikritakapping hjá Leikpalli Føroya við hesum leikinum.

»Eitur nakað land week-end?« verður eisni leiktur hesar dagarnar og nógvir leikir eru á skránni, bæði í Havn og kring landið.

Leikirnir eru Tere, Jo Strømgren Kompani, Noreg. Elektra, Uppsala Statsteater, Svøríki. Hóvliga, Elektra, Tjóðleikhúsið, Ísland. Eitur Nakað land Week-end?, Gríma, Føroyar. Vinden Viskar, Masthuggsteatern, Svøríki. Gunnlaug Ormstunga, Teater Pero, Svøríki. Macbeth, Norðurlendsk verkætlan. Kópakonan í leiki og dansi, Dramaverkstaðið hjá Hjørdis Johansen.